

*Finnbogi Arge, stjóri hjá P/F Meinhardt Arge, á økinum sum nú verður gjørt klárt til at seta nýggjar bilar á*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

P/F Meinhardt Arge:

# Upp til 40.000 í avsláttri

**P/F Meinhardt Arge fríðkar í hesum døgum um økið norðan fyri bilasøluna. Økið liggur væl fyri, tí nógv ferðsla er eftir Ringvegnum beint niðanfyri, sigur stjórin, Finnbogi Arge**

BILASØLA

Í sambandi við at P/F Meinhardt Arge í hesum døgum fríðkar um økið norðan fyri bilasøluna, og stykkið verður planer-að og gjørt klárt at seta bilar á, hevur felagið valt at selja allar teir nýggju bilarnar, ið eru á goymslu, við avsláttri upp til 40.000 krónur, sigur stjórin, Finnbogi Arge.

Økið er umleið 3.000 fermetrar stórt, og er sostatt størri enn stykkið sunnan fyri bilasøluna, sum fyritøkan herfyri seldi til Reyni Service. Økið liggur væl fyri, tí nógv ferðsla er eftir Ringvegnum beint niðanfyri, sigur Finnbogi Arge.